| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 06. mars 2012 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2012 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2012 tann 06. mars kl. 16.30 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 02. mars 2012 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus S. Midjord
Petur Abrahamsen

Sonni á Horni hevði forfall til fundin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 07/2012.**

**Uppskot um til kunngerð um vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanleggingar til hoyringar.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 21. februar 2012 um hoyring kommununar í sambandi við uppskot til kunngerð um vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging.

Møguligar viðmerkingar skulu verða ráðnum í hendi 9. mars 2012.

Ætlanin hjá landsstýrismanninum er við heimild í § 7 í løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanleggingar eftir ásetingum í kommunuvallógini í apríl 2012.

Fólkaatkvøðan verður skipað soleiðis, at veljarin verður spurdur, um hann tekur undir við, at kommunurnar í hansara øki verða skipaðar í eina kommunu. Økini verða 7 og fyri okkara viðkomandi verður talan um eina Eysturoyarkommunu, hetta vísandi til § 3, stk. 3 í uppskotinum til kunngerð ”øki 2). Tekstur: Tekur tú undir við, at Eysturoyggin, te. Fuglafjørðar-, Eystur-, Nes-, Runavíkar- og Sjóvar kommunur verða skipaðar í eina kommunu.

Ætlan landsstýrisins er, at kommunurnar yvirtaka ábyrgdina av eldraøkinum og fólkaskúlanum. Eldraøkið verður lagt út til kommunurnar tann 1. januar 2014, meðan miðað verður eftir størri skúlaeindum við atliti at menna fakliga og námsfrøðisliga umhvørvið.

Um so verður at kommunurnar ikki hava skipað seg í størri eindir, tá ið økini verða løgd út, er ætlan landsstýrisins, at økini verða løgd til kommunal samstørv svarandi til eindunum í galdandi lóg um kommunusamanlegging, men er landsstýrið tó opið fyri, um kommunurnar ynskja tað, kann talan gerast um 8 samstørv í tí førinum, at Eysturoy verður 2 eindir.

Landsstýrismaðurin hevur í fyrstu atløgu ongar ætlanir um at leggja kommunurnar saman við lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 28. februar 2012, og varð avgerð tikin um, at býráðsleiðslan ger uppskot til svarskriv til Innlendismálaráðið, sum sent verður býráðslimunum saman við innkalling til eykabýráðsfundar.

**Avgerð:**
Býráðsleiðslan hevur gjørt uppskot til svarskriv til Innlendismálaráðið, dagfest 02. mars 2012, og varð hetta sambært omanfyri standandi avgerð sent býráðslimunum saman við innkalling til eykabýráðsfundar sama dag og varð hetta samtykt við broytingum (8-0), og er tessvegna soljóðandi:

Fuglafjarðar býráð hevur havt uppskotið til viðgerðar á fundi tann 06. mars 2012 og hevur gjørt sínar viðmerkingar til bæði skrivið frá Innlendismálaráðnum og uppskotið til vegleiðandi atkvøðuna um kommunusamanleggingar.

Tikið verður undir við at landsstýrismaðurin í innlendismálum skipar fyri eini vegleiðandi fólkaatkvøðu, sum annars er í tráð við viðmerkingarnar frá Kommunusamskipan Føroya til IMR, dagfest 12. januar 2012 og samtykt býráðsins frá 14. juli 2011.

Tó metir býráðið, at fyriliggjandi uppskot um fólkaatkvøðu ikki lýsir fyrimunir og vansar nóg væl, so borgarar kunnu taka støðu á fólkaatkvøðuni.

Ongar lógir eru lýstar á hesum báðum økjum, bert ætlanir, somuleiðis sum ein fígging ikki er neyvt lýst, men bert tekstur, at peningur fylgir við.
Eisini metir býráðið tekstin í skrivi landsstýrismann ógreitt á 3 niðasta reglubroti: *"Landsstýrið er tó opið fyri, at um kommunurnar ynskja tað, kann við **samanlegging** talan gerast um 8 **samstørv**, í tí føri er Eysturoy tvær eindir".* Tosað verður bæði um samanlegging og samstarv, hvat meinar landsstýrismaðurin við.

Er tað soleiðis, at treytin fyri einum 8. øki er, at kommunurnar í øki 2 taka undir við samanlegging ella at tað bert skulu verða fólkaatkvøðurnar í Fuglafjarðar- og Eysturkommunu, sum skulu verða avgerandi fyri samanlegging ella samstarvi.

Býráðið tekur sum sagt undir við, at fólkaatkvøða verður hildin í hvørjari einstakari kommunu sær um kommunusamanlegging. Hinvegin halda vit, at tað kann verða eina ávísur vandi fyri, at alt endar við, at tað einans verður ein samanlegging av kommunum, og at einki verður lagt út til kommunurnar at umsita.

Fyri at fyribyrgja hesum og sum alternativ til fólkaatkvøðuna, vil býráðið vísa á, at tingini kundu verið gjørd í øvugtari raðfylgju, at eldraøkið og skúlaøkið verða løgd út til kommunurnar at umsita eftir fíggjarleisti, sum kommunurnar taka undir við, og at kommunurnar síðan sjálvar taka málið um kommunalar samanleggingar ella samstørv upp aftur, um so verður at útleggingin møguliga verður veruleiki.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.10.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus S. Midjord

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen